Kappingareftirlitið

Advokatskrivstovan
Frúutrøð 7
110 Tórshavn

Att: Niels W. Poulsen, adv.

Tórshavn, tann 23. mars 2026

**Viðv.: 26/00142 - Sp/f Ella yvirtekur partapeningin hjá Sp/f DAFA í Sp/f Askur Group**

Kappingareftirlitið hevur tann 4. mars 2026 móttikið eina einfalda fráboðan um yvirtøku, har Sp/f Ella yvirtekur Sp/f Askur Group. Sambært §17, stk. 5 í kappingarlógini byrjar freistin í §18, stk. 1, tá Kappingareftirlitið hevur móttikið fullfíggjaða fráboðan og skjalprógv fyri rindaðum ómaksgjaldi. Freistin fór í gongd tann 4. mars 2026.

Sp/f Ella, sum frammanundan eigur ein triðing av partabrøvunum í Sp/f Askur Group, keypir triðing sum Sp/f DAFA eigur og fær sostatt meirilutan av atkvøðunum í Sp/f Askur Group. Eftir yvirtøkuna eigur Sp/f Ella tveir triðingar av partabrøvunum, meðan Sp/f KEG eigur ein triðing av partapeninginum.

Sp/f Askur Group eigur vinnubygning á Sandvíkarhjalla, sum verður leigaður út til Sp/f Lyfta.
Sp/f Ella, sum frammanundan var eigari av einum triðingi av partabrøvunum í Sp/f Askur Group, hevur nú keypt tann triðing, sum Sp/f DAFA átti, og hevur tískil fingið meirilutan av atkvøðunum í Sp/f Askur Group. Eftir yvirtøkuna verður Sp/f Ella eigari av tveimum triðingum av partabrøvunum, meðan Sp/f KEG framvegis eigur ein triðing av partapeninginum.

Sp/f Askur Group er eigari av vinnubygningi á Sandvíkarhjalla, sum verður leigaður út til Sp/f Lyfta.

Sp/f Ella er eitt holdingfelag, sum harumframt eigur meirilutan av partapeninginum í Sp/f Sendistovuni, og hevur somuleiðis meirilutan í Sp/f Bilasøluni umvegis holdingfelagið Sp/f 15. september 2020.

Kappingareftirlitið góðkendi hin 13. november 2025, at Sp/f Ella yvirtók meirilutan í Sp/f Lyfta. Yvirtøkan av partapeninginum í Sp/f Askur Group og yvirtøkan av partapeninginum í Sp/f Lyfta verða mett sum ein samlað yvirtøka, sambært §14, stk. 3 í kappingarlógini, tí talan er um somu eigarar og seljarar. Somuleiðis hevur Sp/f Lyfta sítt virksemi í tí bygningi, sum Sp/f Askur Group eigur.

Talan er um eina transaktión sum kemur undir samanleggingarhugtakið í §13, stk. 1, nr. 2 kappingarlógini, ið eru støður har ræðisbroyting fer fram í fyritøku ella parti av fyritøku. Umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum er omanfyri markvirðini í §14, stk. 1, nr. 1 í kappingarlógini. Talan er um transaktiónir har tær luttakandi fyritøkurnar samanlagt hava ein árligan umsetning á í minsta lagi 75 milliónir krónur í

Føroyum, og minst tvær av luttakandi fyritøkunum hvør sær hava ein samlaðan árligan umsetning upp á 15 milliónir krónur í Føroyum.

Fráboðað er eftir einfaldum leisti, tí transaktiónin kemur undir §3, stk. 1, nr. 2 í reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025 um samanleggingar, ið eru støða, har fyritøka fær einarræði á eini aðrari fyritøku, sum hon frammanundan hevur havt ræði á saman við øðrum.

Kappingareftirlitið hevur, grundað á fyriliggjandi upplýsingar, tikið avgerð um at góðkenna yvirtøkuna eftir einfalda málsviðgerð, sambært §15, stk. 7 í kappingarlógini, vísandi til §15, stk. 2, har ásett er at ein yvirtøka sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping skal góðkennast.

Góðkenningin er treytað av, at upplýsingarnar sum fráboðari hevur latið Kappingareftirlitinum, eru rættar, sambært §20 í kappingarlógini.

Vegna
Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

Sigurd Rasmussen
Fulltrúi